# Umskipanir hjálptu



Tað var sjálvandi ein fegin Arnbjørn Danielsen, sum vit fingu orðið á eftir dystin í Gundadali.

Hóast spælið ikki hevði verið tað heilt stóra at reypa av, so fekk B36 trý stig, og tá talan so eisini gjørdist um ein trivaligan sigur, er einki at siga til, at smílini í skiftisrúminum vóru stór.

– Eg skal geva tær rætt í, at spælið ikki var tað heilt stóra í fyrra hálvleiki. Har hekk alt ov lítið saman hjá okkum, men eg haldi tó, at hetta betraðist eftir steðgin. Serliga tí vit við eini 4-4-2 fingu betri breidd í spælið, soleiðis at plássið at spæla á gjørdist betri.

Og so fáa tit eisini tvey skjót mál. Tey hjálpa væl eisini til?

– Sjálvandi. Tey hjálptu sera væl. Tað gav okkum beinanvegin meira frið á, men eg haldi eisini, at vit orkaðu betri enn teir. Tað kendis í øllum førum, sum fingu vit tað lættari, so hvørt sum dysturin leið, segði Arnbjørn Danielsen at enda.

**-jm**

# Mistu luftina



Liðskiparin hjá EB/-Streymi, Jákup Martin Joensen, var sjávlandi alt annað enn nøgdur, tá vit hittu hann í løtunum eftir dystin.

Sjálvandi serliga um úrslitið, men heldur ikki tóktist hann halda, at spælið var so gott, sum tað kundi verið.

– Eg haldi tó, at vit koma afturí aftur eina løtu, eftir at teir eru komnir á 2-0. Tá skapa vit nakrar kjansir, og høvdu teir givið mál, so kundi dysturin formað seg øðrvísi.

Tað gjørdi hann tó ikki, og sum Arnbjørn Danielsen segði, so helt hann, at tað móti endanum tóktist, sum var B36-liðið væl betri fyri kropsliga, soleiðis at gestirnir tá ongantíð fingu hótt av álvara.

– Tað haldi eg nú ikki. Men tað er klárt, at tá teir so aftur økja, so fer luftin úr okkum. Tað er nokk meira sálarliga enn kropsliga, at tann møðin kemur, helt Jákup Martin at enda.

**-jm**

# B36-debut



Tá ungi B36'arin, Johan V. Gunnarsson, varð skiftur inn í dystinum móti EB/Streymi, var hetta fyrsta ferðin, at hann var á vølli í fyrstudeildarhøpi.

Soleiðis fekk hann 12 minuttir og eitt mál í sínum fyrsta dysti, og so kann nevnast, at hetta neyvan er seinasta ferðin, at ein Gunnarsson er á vølli fyri besta B36-liðið.

Johan er nevnliga tvíburur, og hin helmingunum av parinum, Ásbjørn, er sjálvandi eisini við í besta B36-hópinum, so helst verður tað ikki leingi, áðrenn árstalsfelagið kann geva debut til enn ein leikara.

**-jm**

B36-EB/Streymur 4-0 (0-0):

# Áki punkteraði gestirnar

**EB/Streymur gav B36 tvær flaggdagsgávur fyrstu løtuna eftir steðgin, men tað var innskifti Áki Mørk, sum av álvara punkteraði dystin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann var ikki stórt meira enn hálvan hálvleik á vøllinum, men eingin ivi var um, hvør var stóri maðurin í B36-leguni sunnudagin. Við tveimu málum móti EB/Streymi var Áki Mørk í øllum førum maðurin, sum í einum hálvgum vánaligum fótbóltsdysti beindi allan iva til viks, og fyribils er úrslitið, at B36 stendur ovast á stigatalvuni, nú fyrsta landskappingarumfarið er farið aftur um bak.



*Ofta hevði B36 sera trupult við at fáa breidd í álopsspælið, har Bárður og Santos lógu langt frá hvørjum øðrum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Óskipaður diamantur

Sum sagt, so var talan ikki um ein serliga góðan dyst í Gundadali sunnudagin. Veðrinum kundu partarnir tó ikki geva skuldina fyri hetta, tí tað man vera sjáldan, at fyrsta landskappingarumfarið verður avgreitt í so góðum líkindum, sum tað var hesaferð.

Men tað var alla tíðina – og serliga fyrstu trý korterini – sum høvdu liðini bæði sera trupult við at finna stevið. Hjá B36 tóktist sera missurin av John Petersen at vera tungur, og dysturin undirstrikaði væl og virðiliga, hvussu stóran týdning mittasti álopsmaðurin hevur, um spælt verður við 4-3-3. Her royndi B36 seg við Jens Eriki Rasmussen, men hann fall í longum løtum aftur á miðvøllin, soleiðis at talan at síggja til gjørdist um ein óskipaðan diamant mitt á.

Tað viðførdi so eisini, at einastu royndirnar til veruligt álopsspæl kom upp ígjøgnum kantarnar, men tað hjálpti tó lítið, tá eingin var at taka ímóti, tá sent varð innfyri. Longu í fyrsta minutti kundi heimaliðið tó lagt seg á odda, tá Ronnie Samuelsen (helst rangstaddur) kom at standa púrasta blankur, men onkursvegna megnaði hann úr fimm metrum at senda fram við málinum.

### Tvær flaggdagsgávur

Øvuta vegin var talan heldur ikki um nakað serliga skipað fótbóltsspæl, men kortini tóktust gestirnir at hava nakað væl meira av broddi í, tær ferðirnar, teir settu ferð á í kontra-spælinum. Tvær ferðir var eisini um reppið, at úrslit spurdist burturúr, men fyri tað mesta tóktust teir tó at leggja dentin á at standa rætt í verjupartinum, og um ikki annað, so tóktist hesin parturin av spæliætlanini at rigga heilt væl.

Alt hetta arbeiði fór tó fyri skeyti, teir báðar fyrstu minuttirnar av seinna hálvleiki. Vandin tóktist annars ikki vera serliga stórur, tá Jens Erik sendi fríspark innfyri, men uttan at vera trýstur yvirhøvur, tór Sorin Anghel í luftdyst við Gunnar á Steig, og úrslitið var, at bólturin av høvdinum hjá rumenska álopsmanninum dalaði niður í tóma málið.

Og áðrenn gestirnir høvdu fingið eyguni uppaftur, stóð 2-0 á talvuni. Hesaferð var tað víkamaðurin, Ronnie Samuelsen, sum við kvikum 1-2 spæli fekk stungið bóltin inn um til Bárð Mortansson, og so mundu tey flestu halda, at dysturin var avgjørdur.

### Áki avgjørdi

EB/Streymur royndi tó at svara aftur, og einar tvær ferðir var eisini heilt nær við, at teir fingu minkað um munin, men so líðandi fánaði hetta tó burtur. Viðvirkandi var eisini, at B36 nú hevði umskipað liðið nakað, soleiðis at talan var um 4-4-2, har serliga Santos og Arnbjørn Danielsen tóktust stórtrívast á miðvøllinum.

Og so var tað, at Jóannes Jakobsen kundi senda trumfin hjá sær á vøllin. Áki Mørk hevur fyri tað mesta verið upptikin av hondbólti í vetur, men nú er tann kappingin liðug, og so skuldi hann prógva, at hann eisini dugir at handfara bóltin við fótunum.

Jens Erik Rasmussen mátti víkja í álopinum, og skjótt stóð greitt, at hetta var ein klók avgerð. Sjálvandi serliga tí Áki var maðurin, sum við tveimum málum sløkti alla vón hjá gestunum hendan dagin, men eisini tí hann í nógvar mátar megnaði at fylla leiklutin, sum John Petersen ofta hevur á liðnum. Kropsliga er hann væl fyri, og tekniski førleikin eins og styrki í loftrúminum standa eisini ovarliga á breddanum, tá tosast skal um dygirnar.

Og so hevur hann eisini máltev. Fyrru ferðina, hann sýndi hetta, var tá hann stútaði innlegg frá Bárði Mortansson í kassan, og nakað seinni var hann aftur maðurin á rætta staðnum, tá eitt illa umhugsað útkast endaði hjá Bárði, sum dróg einaferð, áðrenn hann rullaði upp á tvørs. 4-0 til B36, sum sostatt hevur lagt seg á odda í landskappingini, og við enn einum heimadysti í næsta umfarinum er einki at ivast í, at teir ætla sær at halda fast um hesa støðuna.

## Dysturin í tølum

**B36-EB/Streymur 4-0 (0-0)**
1-0: sjálvmál, 46.
2-0: Bárður Mortansson, 47.
3-0: Áki Mørk, 73.
4-0: Áki Mørk, 85

**B36:** Tróndur Vatnhamar – Arnbjørn Danielsen, Egil á Bø, Pól Thorsteinsson, Sverrir Kjærbo (Johan V. Gunnarsson, 78.) – Niels Joensen, Klæmint Matras (Kenneth Jacobsen, 46.), Ronnie Samuelsen – Bárður Mortansson, Jens Erik Rasmussen (Áki Mørk, 66.), Alex dos Santos
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Gert Hansen, Fróði Clementsen, Andrzej Pacek, Jóhan á Stongum (Esmar Eiðisgarð, 46.) – Bárður Olsen (Carl H. Høgnesen, 70.), Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen (Hallur Jacobsen, 70.), Hans Pauli Samuelsen – Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
**Gult kort**
**B36:** Niels Joensen
**EB/Streymur:** Hans Pauli Samuelsen
**Dómari:** Páll Augustinussen. Uppgávan var ikki av teimum truplastu, og svartklæddi maðurin gjørdi hana so heldur ikki truplari, enn hon var.



HB-KR 3-1 (3-0):

# Stjørnuskot tryggjaði HB Atlantssteypið

**Hendrik Rubeksen var stóri maðurin, men yvirhøvur tóktist alt HB-liðið reisa seg, tá teir leygardagin gjørdust fyrsta føroyska liðið at vinna Atlantic Cup**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB skuldi reisa seg. Tað vóru fremstu boðini í norðara partinum av Gundadali, tá árligi Atlantic Cup dysturin var á skránni leygardagin.

Hetta er dysturin millum føroysku og íslendsku meistararnar, og undan hesum hevði tað ongantíð eydnast føroyskum liði at vinna dystin. Og so kundi kanska verði lagt afturat, at eftir ivasama avrikið á Skála fyrr í vikuni, mundu tað vera fleiri av HB-viðhaldsfólkunum, sum ikki høvdu serliga góðar vónir undan hesi uppgávuni.

### Hamskiftir havnarmenn

Men tey fingu tó skjótt at síggja, at tað var eitt hamskift HB-lið, sum nú var á vøllinum.

Tvær broytingar vóru í mun til dystin á Skála, og báðar skuldu tær eisini vísa seg at vera týdningarmiklar.

Hin fyrra var, at Símun Eliasen nú aftur var í miðverjuni. Her hann ikki trivist serliga væl higartil í ár, men í mun til dystirnar í steypakappingini, so tóktist hann leygardagin at vera nakað væl nærri forminum, sum í fjør gjørdi hann til upplagt landsliðsevni, uttan at hetta tó gjørdist til nakað. Kanska restar enn nakað í, áðrenn hann aftur hevur funnið sama støði, men fyri sjálvsálit hansara – og FM-vónirnar hjá HB – kann tað fáa altavgerandi týdning, at pílurin nú tykist peiggja rætta vegin.

Hin broytingin var, at Heine Fernandez hevði sett seg sjálvan á beinkin hesaferð, soleiðis at Hendrik Rubeksen fekk møguleika at prógva sítt virði. Ikki tí at venjarin hevur spælt so illa, og bara við at hyggja at málskjúttunum í steypakappingini stendur greitt, at hann sum so hevur gjørt sína skyldu. Men avrikið hjá Hendriki leygardagin mundu fáa mong at gloyma Andrew av Fløtum fyri eina tíð.

### Dagsins maður

Ungi framherjin var nevnliga í øllum trimum førunum maðurin aftan fyri HB-málini. Fyrst fekk hann tacklað bóltin yvir til Rúna Nolsøe, sum av brotsteigarmarkinum smekkaði flatt í netið.

Síðani fekk hann tiltuskað sær eitt (heldur ivasamt) brotsspark, sum Vagnur M. Mortensen sendi trygt í meskarnar, og at enda var hann sjálvur rætti maðurin á rætta staðnum, tá hann fekk bent eitt vandamikið innlegg frá Janusi M. Joensen í kassan. Soleiðis tekur mann av einum møguleika, tá mann fær hann handaðan, og í øllum førum prógvaði unglingin, at hann væl kann gerast ein av trumfunum, sum HB noyðiast at smekka á borðið í drúgva FM-stríðnum.

### Tiltrongt lyft

Men tað var tó ikki bert avrikið frá Hendriki, sum HB-viðhaldsfólkini kundu fegnast um leygardagin. Tí sum heild virkaði liðið nakað nógv betri, enn tað gjørdi á Skála mikukvøldið.

Tó at miðvøllurin ikki var umskipaður, so dugdu leikararnir hesaferð í nógv størri mun at halda taktisku avtalurnar. Bæði breidd og djúpd var alofast til staðar, og eitt nú riggaði tað sera væl, at Heðin á Lakjuni datt út móti vinstru, tær ferðirnar Rógvi leitaði sær niðan eftir miðáisini.

Tað skal so eisini takast við, at góða avrikið kanska eisini var upp á eina bíliga bakgrund. Í øllum førum mundi tað koma óvart á mong, at íslendska avrikið var somikið jánkasligt. Kanska kann tað vera ein umbering, at teir av tvørrandi veðurlagnum lendu somikið seint, at dysturin mátti flytast tveir tímar, men fyri steðgin høvdu teir lítla mótstøðu at geva føroyameistarunum.

Eftir steðgin gjørdist tað nakað frægari, og teir fingu móti endanum pyntað um við sera vøkrum stútara, men nóg mikið gjørdist tað tó ongantíð.

Men hjá HB var talan í øllum førum um fyrsta steypasigurin (sum tó einki steyp gav) á føðingardagsárinum, og ikki minst eitt tiltrongt sálarligt lyft. So fer tíðin at vísa, hvønn mun hetta kann gera.



*Heðin á Lakjuni og HB hildu høvdið høgt, tá teir í trý korter spældu íslendsku meistararnar av vøllinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**HB-KR 3-1 (3-0)**
1-0: Rúni Nolsøe, 13
2-0: Vagnur M. Mortensen (br.), 24
3-0: Hendrik Rubeksen, 40
3-1: Henning Jónasson, 90
**HB-liðið:** Pál N. Joensen (Danny Rasmussen, 46) – Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Kári Nielsen (Rasmus Nolsøe, 85.), Rúni Nolsøe (Eli Thorsteinsson, 85), Martin Christensen, Rógvi Jacobsen (Rókur Jespersen, 50) – Heðin á Lakjuni (Páll M. Joensen, 78), Hendrik Rubeksen
**Dómari:** Niklas á Líðarenda. Segði við hesum farvæl sum dómari á hægsta føroyska stigi, og kom hann bara væl frá uppgávuni. Íslendingarnir vóru ofta ónøgdir, men mundu sum heild hava lítið at hava hetta í. So átti Heðin á Lakjuni størri orsøk at vera ónøgdur, tá hann varð feldur í gjøgnumbroti, men hóast tað líktist reyðum og brotssparki, so tagdi floytan eisini ta ferðina. Men sum heild, eitt gott farvæl hjá Niklasi.




FAROE SEAFOOD

Fiskasølusamtakið marknaðarførir eitt stórt úrval av fiskavørum við egnum merki á marknaðum í fleiri enn 30 londum. Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn, og felagið hevur dótturfeløg í Onglandi, Fraklandi og Danmørk. Føroya Fiskasøla er størsta útflutningsfelag í Føroyum. Fiskasølusamtakið hevur dugnalig og professionel starvsfólk, ið dagliga starvast í altjóða umhvørvi.

www.faroe.com

Leiðari til Faroe Finance

**Dugir tú at síggja tingini úr erva? Og hevur tú bæði beinini væl og virðiliga á jørðini? So kanst tú vera persónurin, sum Føroya Fiskasøla leitar eftir.**

Nú vit hava flutt fíggingarfelag okkara til Føroya, søkja vit eftir nýggjum leiðara, sum bæði er roknskaparkønur, dugir at síggja allan sjónarringin og er opin, fríur og útvendur. Leiðarin verður skrásettur stjóri í felagnum.

Faroe Finance er sjálvstøðugt partafelag í fiskasølusamtakinum og hevur til uppgávu at keypa og umsita skuldarar hjá felagnum. Tað vil siga bæði hjá móðurfelagnum í Føroyum og dótturfeløgunum í Fraklandi og Onglandi.

Talan er um eitt arbeiði í altjóða umhvørvi, har samskiftið innanhýsis er við fiskasølufólk í Fraklandi, Onglandi og Føroyum, og úteftir við peningastovnar, tryggingarstovnar uttanlands og kundar í øllum heiminum. Samstundis er neyðugt, at viðkomandi er fullkønur í bókhaldi, tí roknskapurin telur helvtina av starvinum.

Uppgávur leiðarans kunnu skipast í skuldaraumsiting, bókhald og arbeiði við gjaldoyraviðurskiftum. Skuldaraumsiting fevnir millum annað um trygging, keyp, rykking og innheinting av skuldarum. Bókhaldið fevnir í høvuðsheitum um bóking, gerð av fíggjarætlan, mánaðarroknskapi og ársroknskapi. Gjaldoyraviðurskifti umfata eitt nú umsiting av kurstryggingum og bankatrygd.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir innan kredittveiting og gjaldoyra. Tú skalt vera altjóðavendur og hava góðan málsligan førleika. Tað er ein treyt, at tú dugir enskt til lítar, og fólk við kunnleika til týskt og franskt hava ein fyrimun. Tey, ið søkja, mugu duga væl at sam- skifta, duga KT á brúkarastøði og vera fleksibul í dagliga arbeiðnum.

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17. mai 2004. Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Arge, stjóra. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Føroya Fiskasøla P/F • P.O. Box 68 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 345 345 • Fax +298 345 300 • e-mail: faroe@faroe.com